## DAGSINS MEINING

# Fólkið i fremstu røð

Tann samhaldsfasta samfelagsáskoðanin er í stóran mun sett til viks hjá hesum landsstýrinum, hóast smávegis batar eru hendir. T.d. er fólkapensjón hækkað nakað, og harafturt verður Landssjúkrahúsið útbygt í hesum árum. Men í staðin fyri at menna tað samhaldsfasta í samfelagsskipanin gongur alt meiri og meiri á tað øvugta borðið, sum vit síggja í brúkaragjøldum og privatiseringum.

Hesum politikki tekur Javnaðarflokkurin ikki undir, og tað kom greitt til sjóndar á landsfundi hjá flokkinum nú um vikuskiftið. Fundurin tekur tí undir við nýggja valskránni hjá flokkinum, sum setur vælferðina hjá fólki í fremstu røð. Sitandi hevur sett fullveldismálið í fremstu røð og onnur átrokandi mál eru annaðhvørt ikki raðfest ella eru raðfest aftarlaga.

Víst hevur samgongan sett sær fyri at fara at byggja eitt ellis og røktarheim í Norðurstreymoy, men enn er spakin ikki settur í jørðina, og fleiri ár fara at ganga, áðrenn nakar kann flyta inn. Ímeðan gerst røðin av okkara gomlu, sum vilja ella mugu á ellisheim alsamt longri. Javnaðarflokkurin hevur tí sett sær fyri, at kemur hann í landsstýrið eftir næsta val, skulu 160 ellisheimspláss byggjast næstu fýra árini.

Somuleiðis er flokkurin, um hann fær undirtøku, sinnaður at taka eitt dyggiligt stig í samband við eftirlønina hjá pensjónistum okkara. Hetta landsstýrið hevur í fleiri ár lovað, at eitt uppskot til eina nýggja pensjónsskipan skuldi leggjast fram, men tað er ikki komið undan kavi í Almanna og heilsustýrinum enn. Og tað kunnu vit bara fegnast um, um tað skuldi gerast eftir leisti fólkafloksins um eina fólkatrygging.

Ein av høvuðsstólpunum í vælferðarskipanini er heilsuverkið, og á hesum øki ásannar javnaðarflokkurin, at ein veruligur heilsupolitikkur má stingast út i korti. Ein politikkur, sum byggir á fyribyrging, upplýsing, og eitt vælvirkandi heilsuverk, og ikki eitt heilsuverk, sum er so undirmett á játtanum, at arbeiðið er ein kapprenning ístaðin fyri røkt. Stóri spurningurin er so, um flokkurin dugur at fáa henda politikk á dagsskránna undan valinum, sum í seinasta lagi verður í apríl næsta ár.

**Sosialurin**

# Landsfundarsamtykt

## gjørd á landsfundi Javnaðarfloksins í Vestmanna 14. og 15. september 2001



### »Fólkið fyrst«

Landsfundur Javnaðarfloksins tekur av fullum huga undir við valskrá Javnaðarfloksins undir slagorðinum »Fólkið fyrst«.

Landsfundurin heldur, at tað er í tøkum tíma, at lívskorini hjá fólkinum - sum hetta seinasta valskeiðið í stóran mun eru skúgvað til viks - verða sett ovast á politisku dagsskránna.

### Heilsuverkið skal endurreisast

Landsfundurin ásannar, at eitt væl virkandi heilsuverk er hornasteinurin í okkara vælferðarskipan. Tí skal heilsuverkið endurreisast.

### 160 røktarheimspláss

Minst 160 nýggj ellis- og røktarheimspláss gjøgnum fýra ár. Hesa stevnu hevur Javnaðarflokkurin raðfest ógvuliga høgt í nýggju valskránni. Tað fegnast landsfundurin um.

### Minst 10 túsund í pensjón

Eisini fegnast landsfundurin um, at Javnaðarflokkurin hevur sett sær fyri, at pensjónistar skulu fáa eina samhaldsfasta pensjón à 10.000 krónur fyri stakar pensjónistar og 16.000 krónur fyri hjún um mánaðin

### Skulu hava døgnrøkt

Somuleiðis fegnast landsfundurin um, at flokkurin ætlar sær at virka fyri, at heimarøktin verður útbygd við eini døgnrøktarskipan, og at skaptar verða virðiligar umstøður fyri fólk við skerdum førleika.

### Børnini og tey ungu eru framtíðin

Landsfundurin ásannar, at børnini og tey ungu eru framtíðin - fram um oljuna. Tí fegnast landsfundurin um, at Javnaðarflokkurin vil tryggja fólkaskúlanum bestu umstøður at virka undir, soleiðis at hann ikki bert fær framt tað honum er álagt, men fær møguleikar støðugt at mennast.

Fundurin tekur undir við, at flokkurin vil arbeiða fyri at skapa næmingum við serligum tørvi eitt veruligt og dygdargott skúlatilboð.

### Brúkarin skal verjast

Landsfundurin fegnast um, at Javnaðarflokkurin hevur tikið stig til eina brúkaralóggávu, sum skal verja áhugamálini hjá brúkarunum.

### Fjølbroytt vinna

Landsfundurin tekur undir við vinnulívspolitikkinum, sum hevur til endamáls at skapa fleiri arbeiðspláss, ið kunnu geva búskapinum fleiri bein at standa á.

Týdningarmesta tilfeingið er vælútbúgvin arbeiðsmegi. Tí er neyðugt, at arbeiðs- útbúgvingar og lønarviðurskifti eru so, at arbeiðsmegin kann støðast.

### Reinasta land

Tað ábyrgdarloysi og tann líkasæla, sum seinastu árini er víst á umhvørvisøkinum, má steðga beinanvegin.

Landsfundurin tekur undir við, at Javnaðarflokkurin vil taka ábyrgd og seta ferð á arbeiðið, sum skal hava til endamáls at gera Føroyar til heimsins fremsta land, tá um náttúru- og umhvørvisvernd ræður.

### Samfelagslig tilbúgving at møta oljuvinnuni

Landsfundurin ásannar, at enn er alt ov lítið gjørt fyri at møta teimum mongu avbjóðingunum, sum oljuvinnan setur okkara samfelag.

Tí tekur fundurin undir við, at Javnaðarflokkurin vil taka stig til at fáa útgreinað tað árinið, sum ein oljuvinna vil fáa á okkara samfelag og gera tilráðing um, hvussu samfelagið frægast kann búgva seg til at møta hesum avbjóðingum.

### Sjálvstýrislógin er loysnin

Landsfundurin tekur undir við, at Javnaðarflokkurin við Sjálvstýrislógini sum grundarlag vil greiða ríkisrættarligu fløkjuna, sum hetta landsstýrið hevur tveitt landið út í.

Landsfundurin ásannar, at Sjálvstýrislógin er einasta grundarlag undir einari breiðari politiskari semju um stjórnarstøðu Føroya.

*Samtykt á landsfundi í Vestmanna 15. september 2001*

**Føroya Javnaðarflokkur**


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Røgvi heri@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




# Herða trygdarkrøvini

**Fylgjurnar av yvirgangsatsóknunum í USA í seinastu viku, merkjast nú eisini hjá flogfeløgunum á okkara leiðum**

FLOGFERÐSLA
*Edvard Joensen*

Flogfeløgini, sum flúgva til og úr Vágum, hava fingið boð um at herða trygdarkrøvini enn meira, enn tey frammanundan eru. Nýggjar trygdarfyriskriftir eru komnar, og maturin, sum fer umborð á flogførini, verður innsiglaður.Tað er beinleiðis avleiðing av yvirganginum í USA, siga flogfeløgini.

Uni Danielsen, stjóri á Flogfelag Føroya, sum umboðar Maersk Air í Føroyum, sigur, at tað komu beinanveg eftir atsóknirnar í USA boð um, at kassarnir við mati, sum fara umborð á flogførini hjá Maersk Air, skuldu innsiglast.

Hesin matur verður latin av Hotel Vágum, sum Flogfelagið eigur. Og boðini vórðu sjálvandi fylgd beinanveg, sigur hann. Av sínum eintingum hava tey á hotellinum eisini valt at seta plumbur á matkassarnar hjá Atlantsflogi, sum eisini koma frá hotellinum, sigur Uni Danielsen.



*Allar matbingjurnar, sum fara úr køkinum á Hotel Vágum, verða forseglaðar við tveimum plumbum, sum bert mugu brótast umborð á flogfarinum.*

*Mynd: Edvard Joensen*

Tvær plumbur verða settar á hvørja bingju. Ein hvørjumegin, har sum hurðarnar verða læstar. Plumban má ikki verða brotin upp aftur fyrr enn umborð á flogfarinum. Kemur bingja umborð við brotnum plumbum, skal hon koyrast í land aftur beinanveg, áðrenn farið verður á flog.

Kent Christensen, marknaðaleiðari hjá Atlantsflog sigur, at tað skuldi ikki verið neyðugt við slíkum boðum nú, tí tað er nakað, sum leingi hevur verið galdandi. Men sjálvandi er tað bara positivt, at slíkar reglur verða strammaðar uppaftur, sigur hann.

Men Atlantsflog fær eisini mat umborð aðrastaðni frá enn av Hotel Vágum. Tað er eitt nú tvíflísar, sum latnar verða á teimum styttri rutunum hjá felagnum. Tað vil siga til Íslands, Skotlands og Noregs.

Tann maturin kemur frá heilsølu í Havn og verður fluttur vestur í Vágar í vanligum vørubilum og latin flogfarinum í ikki innsiglaðum íløtum.

–Men tað er ikki soleiðis kortini, sigur Kent Christensen, at tað bara fer umborð. Alt, sum fer umborð á flogførini hjá Atlantsflogi, verður latið i bakkum við klárum plastikkloki, og hvør einstakur bakki verður kannaður, áðrenn hann kemur umborð, sigur Kent Christensen. So tann síðan er eisini í lagi, leggur hann dent á.

Magni Arge, stjóri á Atlantsflog, sigur, at tað komu longu í seinastu viku nýggjar trygdarfyriskriftir, sum áleggja flogfeløgunum ymsar reglur, sum fylgjast skulu.

–Ikki tí, at tað ger tann stóra munin her há okkum, tí í Vagum hava trygdarkrøvini altið verið rættiliga høg, sigur hann.

Hann vísir á, eins og flogvallarovastin, Finnbogi Niclasen, gjørdi í Sosialinum í seinastu viku, at úr Vágum er øll ferðsla altjóða flúgving. Og har eru sera hørð trygdarkrøv galdandi.

Flogførini, sum rænd vórðu í USA, vóru innanríkisflogfør, sum ofta flúgva undir linari eftirliti frá landi av. Men tað er so broytt nú, sigur Magni Arge.

Hann sigur, at Atlantsflog nakað skjótt fer undir aftur trygdarskeið, soleiðis, at alt starvsfólkið fær frískað upp aftur tær reglur, sum tey hava at arbeiða undir.

Annars bíðar Atlantsflog í løtuni eftir nærri boðum frá loftferðslumyndugleikunum og møguligum samstarvsavtalum millum ymsu flogfeløgini.

Og sjálvandi fer Atlantsflog at fylgja øllum trygdarfyriskriftum, sum koma, sigur Magni Arge.

# Konsert í Christianskirkjuni

TÍÐINDASKRIV

**Trettan blásarar ú Føroya Symfoniorkestri fara í næstum at spæla tvær konsertir. Tann fyrra verður í Christianskirkjuni leygardagin 22 sept. Kl. 17:00 og tann seinna í Norðurlandahúsinum sunnudagin 23. Sept. Kl. 19:30**

Á skránni verður serenada fyri trettan blásarar av Richard Strauss, Notturno opus 48 nr. 1 av Frédéric Chopin og cellokonsert opus 104 av Antonin Dvorak.

Solistur : Kgl. Kapelmusikus Ib Herman

Dirigentur : Martin Mouritsen

Fyrsta verkið á skránni er "Serenade í Es fyri 13 blásarar" av Richard Strauss (1864-1949). Henda serenada er eitt av ungdómsverkum hansara, og hóast Strauss seinni næstan frásegði sær verkið sum verandi einki annað enn eitt virðiligt avrik av einum tónleikastudenti, so varð verkið fyrstu ferð framført av kenda Meininger Hofkapel við táverðani stórsta dirigentinum, Hans von Bulow. Og ivaleyst hevur tað vælljómandi yndi, sum er yvir verkinum, hugtikið bæði Bulow og tónleikararnar. Tónamálið er romantiskt og líkiast lítið seinni verkum hansara. Verkið er vakurt og vælljómandi, og átøkiligur er tann skiftandi lagdámurin og ljómurin úr teim ymsu blásiljóðførunum, træblásarunum og teim fýra waldhornunum.

Frédéric Chopin (1810-1849) er næstur á skránni. Chopin var í 19 øld mettur at vera ein av størstu klaversnillingunum nakrantíð, og flestu av hansara tónaverkum eru eisini fyri klaverið. Umframt klaverkonsertir, so hevur hann skrivað eina ørgrynnu av smærri verkum, so sum polonaisur, masurkair, etuder o.s.v. , sum hann nýtti til egnar framførðslur. Við síni serligu framferð og sermerktu útsjónd, vóru tað ikki minst kvinnur, sum flokkaðust til konsertir hansara í París, og fleiri teirra skuldu fallað í óvit av ovurundran. Og ikki minst vóru tað hansara notturnoir, hesi vøkru og dreymakendu løgini við náttardámi, sum vóru vælumtókt. Ein av hesum notturnoinum, nr. 48, verður framførd á hesi konsertini, ikki fyri klaver, men í eini útseting fyri 13 blásarar av danska tónasetaranum Peter Naur.

Seinast á skránni er konsert fyri cello og orkestur eftir Antonin Dvorak (1841-1904). Dvorak skrivaði bert eina konsert fyri cello og orkestur, opus 104 í h-mol og er hon skrivað í Ameriku veturin 1894-95, um sama mundið, sum hann skrivaði sítt kanska kendasta verk, symfoniina "Úr nýggja heiminum". Sum allur tónleikur Dvoraks, er konsertin sera sangbar, og ber í sær tilfar úr tjekkiskum/bøhmiskum fólkatónleiki. Cellokonsertin er sum vant í trimum satsum, og byrjar við einum orkesturforspæli, kunnandi um høvuðstemaðið og beint eftir kemur tað sanagbara og fólkaliga síðutemaðið. Annar satsurin er ein adagio, og hevur sum tema ein av sangum Dvoraks, meðan seinasti satsurin, sum onkur hevur nevnt tað, strálar av frøði yvir, at hann nú skjótt skal aftur til sítt elskaða føðiland, Tjekkia ella Bøhmen ; Dvorak treivst ongantíð rættuliga í "Nýggja heiminum ".

Hetta er ein forkunnug útgáva av hesi cellokonsertini, tí hon er upprunaliga skrivað fyri vanligt symfoniorkestur, men verður her framførd í eini útseting av danska tónasetaranum Peter Naur. Solistur er danski celloleikarin Ib Herman.

Hetta er ein spennandi og - sum nevnt - forkunnug konsertskrá, har nakrir av okkara fremstu tónleikarum á klassiska veinginum vera teir, sum fara at manna tónleikabólkin. Vónandi vilja fólk geva sær stundir at vitja.

Konsertirnar verða í Christianskirkjuni leygardagin 22 sept. Kl. 17:00 og í Norðurlandahúsinum 23. Sept. Kl. 16:00.

## Arkitektur námsferð

MENTAN
*Turið Kjølbro*

Nevndin í grunninum Dansk-Førøsk Kulturfond upplýsir, at Annie Heinesen úr Keypmannahavn, sum lesur á Kunstakademiets Arkitektskole hevur fingið “Dansk-Færøsk Samfunds Studierejselegat” fyri ár 2001 til eina námsferð til Føroya. Ongar umsóknir vóru til eina tilsvarandi ferð til Danmarkar.

Samstundis boðar grunnurin frá, at 26. august 2002 verður kunngjørt, hvør fær úr Dansk-Færøsk Kulturfond næstu ferð. Umsóknir skulu verða grunninum í hendi áðren 1. juni næsta ár.